Bestu tippararnir

Formula-tipping
Topp 10

1	Rógvu	17
1	Suni Juul Pedersen	17
3	Oddmar á Lakjuni	15
4	Teitur Simonsen	14
4	Regin Davidsen	14
5	Helgi Poulsen	14
7	Thorvald Jacob Petersen	13
7	Høgni Árting Danielsen	13
7	Heri Ósá	13
7	Brian Jensen	13

HM-tipping
Topp 10

1	Magnus Simonsen	29
2	Ragnar Háskor	28
2	Debes Danielsen	28
4	Jákup Ósá	27
4	Jóhan Damgarð Eysturdal	27
6	Jóan Pauli Jespersen	25
7	Jákup Mørk	24
7	Áki Andreasen	24
7	Ronni Poulsen	24
10	Róaldur Jacobsen	23
10	Rúni Mortensen	23

STUTT SAGT

HM í tipping hálvrunnið

Tann parturin av tippingarkappingini, sum snýr seg um HM, er nú hálvrunnin. Higartil hevur Magnus Simonsen lagt seg á odda, men munurin til næstu tippararnar er sera lítil

TIPPING
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Dagurin í dag er fyrsti frídagurin fyri skíggjan, síðani HM varð sparkað ígongd fyri trimum vikum síðani. Fyrsti parturin av knock-out fasuni er farin aftur um bak, og nú eru bara átta lið eftir av teimum 32, sum løgdu til brots í endaspælinum.

Tí er kanska eisini eitt hóskandi høvi at hyggja at, hvussu støðan er í tippingarkappingini, sum Sosialurin hevur um HM. Kappingin fer fram á tipping.sosialurin.fo, og er ókeypis.

Hóast tað helst verður trupult at enda á toppinum í sjálvari HM-kappingini, so er á ongan hátt ov seint at fara ígongd enn. Tað er nevnliga ikki bara fyri HM-kappingina, at vinningur verður latin. Í Formula-deildini verður eisini tippað, og har eru framvegis 13 umfør eftir, áðrenn besti tipparin kann kjósast. Mánaðarvinningar eru eisini á skránni, og tí ber til at kappast um góðar vinningar heilt fram til tað seinasta.

Í HM-kappingini er Magnus Simonsen higartil fremsti luttakarin við ikki færri enn 29 av 48 møguligum stigum. Fyri at fáa 48 stig, skuldu øll tey átta úrslitini í 1/8-finalunum tó verið rætt tippað, og sannlíkindini fyri at hetta nakran tíð fer at henda munnu vera serstakliga fá.

Tað eru tó fleiri, sum eru beint í hølunum á Magnusi. Bert tvey stig skilija bestu fimm tippararnar, og tað er ikki meira enn so, at hetta alt kann broytast eftir bert einum dysti, so alt í alt røkist fyri, at spenningurin um endaligu støðuna fer at halda sær fram til seinasta dystin.

Tippið við vinunum

Umframt at taka lut í samlaðu kappingini, ber eisini til at hava kappingar við vinum á tipping.sosialurin.fo. Á valmyndini, sum kemur fram, tá tippingarkappingin er vald, ber til at velja sær tipp-vinir. Við at leita upp á vinir, ber til at biða sær ein ella fleiri vinir at tippa saman við og ímóti, og á síðuni sæst so, hvussu innan hýsis støðan tykkara millum er.

Eisini ber her til at síggja, hvussu vinir tínir hava tippað higartil í kappingini, soleiðis at ein samanbergin millum stigaheintanina kann gerast. Og so kann eisini síggjast, hvussu vinir tínir hava tippað til komandi umfarið. Í hesum seinasta ber tó bara til at síggja, hvønn vinirnir hava tippað sum vinnara, ella um javnleikur er gittur. Sjálv úrslitatippingin framgongur ikki av hesum, tí tað skal jú helst ikki verða so, at vinirnir støðugt fáa sama stigatal fyri hvørt umfarið.

-mørk

Hans Kristian á odda í Vági

Vinnarin frá í fjør er fremstur í 2nd Suðuroy International, nú fimm umfør eru telvað

TALV
Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Hevur Hans Kristian Simonsen onkran serliga tokka til syðstu oyggj? Í øllum førum telvar hann sum ein brandur hvørja ferð hann vitjar Suðuroy.

Í fjør var hann ósvitaliga tryggur og vann kappingina á Tvøroyri. Í ár verður telvað í Vági og mynstrið er hitt sama: Hinir elta Hans Kristian.

Føroyingar mynda toppin

Eitt mynstur sum tó brýtur frá í mun til í fjør er, at í ár eru fleiri føroyskir telvarar væl við í oddastríðnum. Hans Kristian hevur fýra stig eftir fimm umfør, og beint aftanfyri kemur John Arni Nilssen við 3,5 stigum. Danski altjóða meistarin Bjørn Brinck-Claussen hevur somuleiðis 3,5 stig. John Rødgaard hevur 3 stig, eins og IM Simon Bekker-Jensen, og Helgi Dam Ziska hevur 2,5. Sjúrður Thorsteinsson reikast í botninum, men javnleikur ímóti Bekker-Jensen og góður sigur á Per Andreasen seinastu umførini, hava hjálpt munandi um støðuna.

Helst fer kappingin at standa ímillum Hans Kristian, John Arna, Brinck-Claussen og Bekker-Jensen. Møguliga Helgi kann órógva toppin við einum eventuellum endaspurti.

Hóast Rødgaard er væl við, so tykist talvhugur hansara ikki stórur í Vági. Hann hevur nevniliga leikt tey flestu talvini javnt eftir heilt fáum leikum. Men møguliga og vónandi fer hann at gera ein vørr seinastu fýra umførini.

Normjagstranin

Helgi hevur telvað nakað óstøðugt. Tveir sigrar, tvey tap og ein javnleik. Eins og Hans Kristian, skal Helgi hava 7 stig av 9 fyri at røkka normi. Hesin møguleikin er tíverri longu farin hjá Helga, men Hans Kristian hevur framvegis góðan møguleika at vinna sær sín næsta norm. Hans Kristian vann eitt gott talv í 3. umfari ímóti Helga. Talvið hesa vikuna í blaðnum.

Tað hevði verið stuttligt um kollfirðingurin enn einaferð hevði vunnið sær altjóða norm í Suðuroy.

Góðar umstøður í Vági

Fyriskiparin Rani Nolsøe letur væl at umstøðunum og gongdini higartil. Útlendsku telvararnir lata somuleiðis væl at umstøðunum og stórtrívast í vakrastu oyggj í Føroyum.

Rani fegnast serliga um úrslitini higartil hjá Hans Kristiani og John Arna. Hesin seinast nevndi hevur sjáldan havt góðar kappingar heima í Føroyum, men í ár tykist hann sera væl fyri. Mikudagin hittast eitt nú Helgi - John Arni og Hans Kristian - Bekker-Jensen í 6. umfari. Tvær sera uppgerðir.


Hans Kristian Simonsen

Kappingin fevnir um níggju umfør og endar leygardagin 1. juli. Telvað verður í Vágs Skúla

FAKTA

Støðan eftir 5. umfør

1 Hans Kristian Simonsen	FAI	(2295)	4,0
2 IM bjørn Brinck-Claussen	DEN	(2359)	3,5
3 IM John Arni Nilssen	FAI	(2356)	2,5
4 IM John Rødgaard	FAI	(2344)	3,0
5 IM Simon Bekker-Jensen	DEN	(2393)	3,0
6 Helgi Dam Ziska FAI	(2306)	2,5	
7 WGM Lenka Ptacnikova	ISL	(2183)	2,0
8 Omar Salama	EGY	(2214)	1,5
9 Sjúrður Thorsteinsson	FAI	(2067)	1,5
10FM Per Andreasen	DEN	(2303)	0,5

Talvið hesa vikuna

Hans Kristian Simonsen (2295) - Helgi Dam Ziska (2306)

Suðuroy International 2006 Vágur (3), 26.06.2006

1.d4 Rif6 2.c4 g6 3.g3 Bg7 4.Bg2 0–0 5.Rif3 d6 6.0–0 Ribd7 7.Ric3 e5 8.e4 (Hans Kristian dámar væl hesa støðutýpu ímóti kongaindiskum) 8...a6 9.Rb1 b5 10.cxb5 axb5 11.b4 Bb7 12.Fc2 c6 13.dxe5 dxe5 14.Rd1 Fe7 15.a4 (Hans K. roynir at skapa lív í støðuna við hesum áhugaverda leiki) 15...Rfc8 16.Rid2 c5 (Hart móti hørðum...) 17.Ba3 bxa4 18.bxc5 Bc6 19.Rid5! (Hvítur hevur initiativið við hesum sterka riddaraleiki) 19...Fe6 20.Ric4 Rab8 21.Rxb8 Rxb8 22.Ric7! Fe7

Støðumynd eftir 22…Fe7

23.Rd6! (Vinnandi leikur. Fær a-finnuna, umframt betri støðu) 23...Bb5 24.Rixb5 Rxb5 25.Fxa4 Rxc5 (Ja, handan finna hevði farið beint á mál...) 26.Bxc5 Rixc5 27.Fa8+ Bf8 28.Rd8 Rie6 29.Rc8 Fb4 30.Bf1 Fe1 31.Rixe5 Fxe4 32.Fxe4 Rixe4 33.Bc4 Ri6g5 34.Rid7 Rid6 35.Rxf8+ 1–0